Amerikanska kanningarskipið Persistent:

Lurtar eftir kavbátum?



Lítið fæst at vita um, hvat amerikanska kanningarskipið "Persistent" gjørdi um okkara leiðir, tá tað í ódnini varð noytt til at koma í havn. Skiparin sigur, at vísindamenn eru við skipini og gera teir havrannsóknir. Amerikanska sendistovan sigur, at talan er um eitt havansingar- og eftirlitskip, sum fyrst og fremst fylgir við fremmandum kavbátum. Landsstýrið, sum hevur játtað umsókn frá donsku verjukommandoini um at loyva skipinum at liggja í Havn í nakrar dagar, hevur skilt tað soleiðis, at talan er um eitt vanligt havrannsóknarskip.

Tað er framvegis ikki greitt, hvørji ørindi amerikanska skipið"Persistent" hevði við Føroyar, tá tað seint mánakvøldið máttu koma á Havnina fyri veður. Tá Tíðindablaðið Sosialurin royndi at koma umborð á skipið týsdagin fekk blaðið greið boð frá skiparanum, at tikið varð ikki ímóti pressuni.

Hann var sera fámæltur men segði tó so mikið, at skipið vanliga varð leigað út av antin herflotanum í USA ella privatum fyritøkum. Eisini segði hann, at skipið gjørdi oceanografiskar kanningar, í hesum føri av aldunum í Norðuratlantshavi, og at tað vóru 9 vísindamenn við.

Blaðið hevur roynt at fáa nakað meira at vita um skipið men eingin tykist vita nakað. Marinustøðin sigur, at talan er um eitt havrannsóknarskip og hava teir sum so einki at gera við tað.

Uppá fyrispurning um teir ikki kannað eftir, hvat slík kanningarskip gera undir Føroyum fáa vit at vita, at tað er frí sigling á heimsins høvum. Ovastin á Marinustøðini er í Danmark men kemur aftur í dag.

Havansingarskip

Amerikanska sendistovan í Keypmannahavn hevur heldur ikki nøgvar upplýsingar. Teir vísa til bókina "Jane's Fighting Ships" frá 1991-92, og sambært henni er skipið eitt sokallað havansingarskip. Tað hevur m.a. til uppgávu at leita eftir kavbátum. A kaðalinum, sum skipið hevur á eini trumlu fyri aftan, er ein sonda, sum lurtar eftir kavbátum.

Talan er um eitt civilt skip, sum verður leigað av amerikanska flotanum men eisini kann leigast út til privatar fyritøkur. Uppá fyrispurning um kalda kriggið ikki er av sigur ein talsmaður á amerikonsku sendistovuni, at tað kortini verður fylgt við russiskum kavbátum, sum sigla á leiðunum millum Bretland og Grønland. Men vit fáa einki ítøkiligt at vita um, hvat skipið ger í løtuni og hvør leigað tað út. Hann metir ikki, at skipið kann gera seismiskar kanningar.

Landsstýrið umsókn

Úr landsstýrinum frætta vit, at tað týsdagin fekk umsókn frá donskum myndugleikum um at loyva skipinum at liggja á Havnini í nakrar dagar. Talan var um eitt havrannsóknarskip.

Hjallgrím Hilduberg, skrivstovustjóri sigur, at landsstýrið hevur fingið at vita, at skipið ikki skuldi gera havrannsóknir her og at tað bara kom framvið Føroyum.

Tá landsstýrið fekk umsóknina lá skipið longu við molan. Um orsøkin er veðrið ella onnur orsøk veit hann ikki at siga. Vanliga eru tað havnamyndugleikarnir, sum taka sær av slíkum, men tá talan er um eitt statsskip, so skal hetta ganga gjøgnum landsstýrið.

Hjallgrím Hilduberg sigur, at tað er einki óvanligt í, at slík havrannsóknarskip koma hendavegin.

Frá Ríkisumboðnum, sum hevur sent umsóknina til landsstýrið, fáa vit at vita, at tey fingu umsóknina frá verjukommandoini, sum hevði fingið loyvi frá verjumálaráðnum at søkja beinleiðis.

Persistent liggur framvegis við bryggju í Havn. Hóast drúgvar royndir at finna fram til, hvat skipið í veruleikanum tekst við um okkara leiðir, so hava vit ikki fingið hetta at vita. Er skipið í hernaðarligum ørindum, ger tað oceanografiskar kanningar ella okkurt heilt annað?

Sambært amerikonsku sendistovuni í Keypmannahavn er talan um eitt havsansingar- og eftirlitsskip (havovervågningsfartøj). Landsstýrið hevur fingið at vita, at talan er um eitt havrannsóknarskip.

Hvat so er rætt og hvøjar arbeiðsuppgávur skipið hevur á hesum leiðum fáa vit kanska ongantíð at vita.

jan

18 STALWART CLASS: OCEAN SURVEILLANCE SHIPS (AGOS)

Name	*No*	*Laid down*	*Commissioned*	*F/S*
STALWART	T-AGOS 1	3 Nov 1982	9 Apr 1984	TAA
CONTENDER	T-AGOS 2	10 Jan 1983	29 July 1984	TPA
VINDICATOR	T-AGOS 3	14 Apr 1983	20 Nov 1984	TAA
TRIUMPH	T-AGOS 4	3 Jan 1984	19 Feb 1985	TPA
ASSURANCE	T-AGOS 5	16 Apr 1984	1 May 1985	TPA
PERSISTENT	T-AGOS 6	22 Oct 1984	14 Aug 1985	TAA
INDOMITABLE	T-AGOS 7	26 Jan 1985	1 Dec 1985	TPA
PREVAIL	T-AGOS 8	13 Mar 1985	5 Mar 1986	TAA
ASSERTIVE	T-AGOS 9	30 July 1985	12 Sep 1986	TPA
INVINCIBLE	T-AGOS 10	8 Nov 1985	30 Jan 1987	TAA
AUDACIOUS (ex *Dauntless*)	T-AGOS 11	29 Feb 1986	18 June 1989	TPA
BOLD (ex *Vigorous*)	T-AGOS 12	13 June 1988	20 Oct 1989	TAA
ADVENTUROUS	T-AGOS 13	19 Dec 1985	19 Aug 1988	TPA
WORTHY	T-AGOS 14	3 Apr 1988	7 Apr 1989	TAA
TITAN	T-AGOS 15	30 Oct 1986	8 Mar 1989	TPA
CAPABLE	T-AGOS 16	17 Oct 1987	8 July 1989	TAA
TENACIOUS (ex *Intrepid*)	T-AGOS 17	26 Feb 1988	8 Nov 1989	TPA
RELENTLESS	T-AGOS 18	22 Apr 1988	8 Mar 1990	TAA

Displacement, tons: 2262 full load
Dimensions, feet (metres): 224 × 43 × 14.9 *(68.3 × 13.1 × 4.5)*
Main machinery: Diesel-electric, 4 Caterpillar 398 diesel generators; 1600 hp; 2 shafts; 550 hp bow thruster
Speed, knots: 11. 3 when towing. **Range, miles:** 4000 at 11 kts; 6450 at 3 kts
Complement: 30-33 (9 officers) (21 civilian manning; 9-12 Navy contingent)
Radars: Navigation: Two Raytheon; I band
Sonars: UQQ2 SURTASS; towed array; passive surveillance

Comment: This programme has been completed after several rocky years stemming from the financial difficulties of Tacoma Boatbuilding Co, which built the first eight ships but initially was unable to complete T-AGOS 9-12 before filing for bankruptcy. Halter Marine built T-AGOS 13-18. The ships are operated and maintained by civilian contractors. SURTASS is a linear array of 8575 ft *(2614 m)* deployed on a 6000 ft *(1829 m)* tow cable and neutrally buoyant. The array can operate at depths between 500 and 1500 ft. Information from the array is relayed via WSC-6 (SHF) SATCOM link to shore. Patrols are of 60-90 days duration which even with passive tank stabilisation is a long time to wallow around at 3 kts. Many of the COs are retired USN Captains.